DAGSINS MEINING

Vinna og mentan = vinnumenning

Ikki meira enn hevur seinasti luttakarin á fiskivinnutinginum í Nor›urlandahúsinum lati› dyrnar aftur eftir seg, ver›a somu dyr latnar upp aftur fyri luttakarunum á stórari oljurá›stevnu. Hetta hús, sum fyrst og fremst er ætla› at h‡sa mentanarligum tiltøkum, er í oktober karmur um tvey áhugaverd vinnulig tiltøk - fiskivinnuna, sum roynir at betra um flutningsmøguleikarnar fyri at økja um útflutningsvir›i› á okkara fiski - og oljuvinnuna, sum stendur á gáttini og vil gerast partur av framtí›ar føroyska samfelagnum.

Ta› er vert at geva júst hesum gætur, at ta› er eitt mentanarhús, sum er vi› til at eggja vinnufólki til at bróta upp úr n‡ggjum og leita n‡ggjar lei›ir fyri at tryggja Føroyum inntøkumøguleikar.

Hetta vi› vinnu og mentan er so eisini ta›, sum ein av høvundunum í serbla›num, sum Sosialurin gevur út í dag, nemur vi›. Og høvundin er eingin annar enn stjórin í sama mentanarhúsi. Helga Hjørvar rakar seymin á høvdi›, tá hon tengir saman vinnu og mentan og vísir á, hvussu hesi bæ›i kunnu byggja brúgv til eitt betri og sterkari samfelag, hvussu vinnulívi› kann stu›la undir mentanini og øvugt. Hvussu hesi bæ›i sum tvær t‡›andi súlur undir samfelagnum kunnu birta uppundir stø›uga menning. Vinna og mentan = vinnumenning.

Rá›stevnan í Nor›urlandahúsinum í dag og í morgin kann fyri mong s‡nast sum eitt vanligt tiltak, sum naka›, sum kemur og fer. Hon er tó naka› meira. Tí hon setir ljóskastaran á føroyskt vinnulív í einum n‡ggjum høpi, nevniliga hvussu fyritøkur í Føroyum kunnu gearast til at luttaka í eini n‡ggjari altjó›a vinnu sum oljuvinnan er ta›.

Ta› er eftir okkara tykki bæ›i rætt og skilagott at stíla fyri slíkari rá›stevnu júst nú, solei›is at tey feløg, sum hava fingi› tilluta› loyvi at bora á landgrunninum, vísa málinum um føroyska luttøku størsta álvarsemi. Men ta› hevur eisini alstóran t‡dning, at somu oljufeløg gera føroyskum vinnulívi greitt, hvørji krøv ta› má liva upp til fyri at kunna gerast veitari til hesa vinnu.

Ein rá›stevna kann vera vi› til lata upp fyri einum dialogi. Vit hava brúk fyri oljufeløgunum, og tey skulu eisini hava brúk fyri okkum. Partur av teirra virksemi er, heldur enn at gera ta› torført og ómøguligt, at stu›la uppundir okkara vinnulív, solei›is at ta› kann liva upp til n‡ggju avbjó›ingarnar, sum oljuvinnan setir. Skal talan vera um eina "win to win" stø›u, so mugu oljufeløgini eisini gera sítt til fyri at fáa føroyska vinnulívi› vi› í menningina. Men ta› krevur so aftur av vinnulívinum, at ta› ger eitt dygdargott arbei›i.

NØVN Í VIKUNI

Herfyri anda›ist Andreas Lava Olsen, Glyvrar, 68 ára gamal. Andreas Lava Olsen var verkfrø›ingur og ein stóran part av lívinum starva›ist hann sum stjóri á Havsbrún í Fuglafir›i. Andreas Lava Olsen, ella Lavama›urin, sum fuglfir›ingar skjótt fóru at kalla hann, var vi› at menna Havsbrún og leg›i rygg til, at hendan fyritøka í dag er fremsta ídna›arfyritøka í landinum.

Andreas Lava Olsen var ein ma›ur vi› visiónum og hann dugdi eisini at seta hesar í verk. Hann hevur í mong ár veri› virkin í vinnulívi og felags arbei›i í samband vi› vinnulív og hann hevur veri› ein eldsál á hesum øki.

Andreas Lava Olsen var ein vitugur ma›ur og hann hev›i lætt vi› at seta seg inn í n‡ggj ting. Hann var kendur sum ein avgjørdur stjóri.

Eftir lokna útbúgving starva›ist hann millum anna› í Grønlandi og fór sí›an til Thyborøn at arbei›a á fiskamjølsverksmi›juni har. Me›an hann var í Thyborøn vóru lunnar lagdir undir Havnbrún og fyrst í sjeytiárunum kom Andreas heim til Føroya. Hann starva›ist á Havsbrún øll árini, til hann leg›i frá sær fyri tveimum árum sí›an.



Vinirnir siga, at Andreas var ein fittur og ágr‡tin ma›ur. Hann var undirhaldandi. Vóru fólk samankomin og eitt klaver stó› nærhendis, so sat Andreas vi› ta›, og so var beinanvegin sangur og gaman. Sum heilt ungur, í realskúlanum í Havn, spældi Andreas til dans. Sum í øllum, so gekk hann upp í hetta eisini vi› lív og sál, so nógv, at skúlastjórin hev›i hug at tala at, tí Andreas var ov linur um morgnarnar.

Andreas hev›i nógv áhugamál. Hann hev›i stóran áhuga fyri samfelagsvi›urskiftum og bar ongantí› bangin at siga sína hugsan. Í frítí›ini fekkst hann vi› ættargransking. Hann var eisini fittur í hondunum og hev›i egnan verksta› heima.

Ein vinur sigur, at Andreas var perfektionist og at hetta sást aftur í øllum virki hansara.

Andreas var giftur vi› Gretu, og tá hann fekk starv í Fuglafir›i settust tey ni›ur á Glyvrum og har hava tey hildi› til sí›an.

je

Oluffu í Gongini til minnis

Í dag ver›ur Oluffa Jensen - betur kend sum Luffa í Gongini - borin úr Havnar Kirkju. Luffa anda›ist brádliga hóskvøldi›, 88 ára gomul, og vi› henni hvørvur ta› gamla ættarli›i› á Reyni, tí Luffa er hin seinasta av teimum gomlu, sum er fødd, uppvaksin og sum hevur bú› í gamla b‡linginum í Havnini so at siga ævina alla.

Kom at kenna Luffu fyri tólv árum sí›ani, tá vit gjørdust grannar í Gongini. Tá høvdu Luffa og ma›urin, Harald, bæ›i blómuhandilin í Knútsstovu og gamla grønthandilin í Dandastovu.

Luffa fór til Danmarkar, har hon giftist Haraldi. Tey búsettust í Keypmannahavn og fingu børnini Eivind, Tove og Honnu. Tey vóru ni›ri undir krígnum, men fluttu til Føroya eftir kríggi›. Ætlanin var ikki, at tey skuldu flyta heim, tá tey komu í 1946, hevur Luffa greitt frá. Tey vóru heima og fer›a›ust, og me›an tey vóru her, sigldi Tjaldri› á Mjóvanes og sakk. Tí var eingin fartur ni›uraftur, so tey máttu bí›a. Tey búleika›ust tá í barnaheiminum hjá Luffu, undir Kletti, og Harald, sum var málari, fór at arbei›a. Honum dámdi so væl í Føroyum, at tey vór›u verandi. – Eg tímdi ikki at vera her. Ta› var Harald, sum treivst so væl her, hevur Luffa so ofta greitt frá. Harald doy›i í 1991.

Ta› var ta› blí›a, lætta og fyrikomandi lyndi›, sum ey›kendi Luffu. Humorin hev›i hon gó›an, og ta› var fragd at lurta, tí hon hev›i so nógv at grei›a frá, og sum vera man visti hon nógv at siga um gomlu Havnina og fólkini, i› har bú›u. Hon greiddi m. a. frá, at hon var vi› til at lata Blákolluna - kioskina, sum fyri kortum lat aftur - upp fyrst í tríatiárunum, haldi hon seg›i í 33. Hon greiddi mær eisini frá stórhendingini, tá fyrsti bilurin kom til landi› í 1922. Hann kom vi› DFDS-skipinum Island. Nágreiniliga mintist hon, hvussu bilurin var ferga›ur í land vi› prámi - og fingin upp á land á Kongabrúnni. Annar av teimum, i› átti bilin, var systkinabarn hennara, Hannis Olsen. Ta› stuttliga hendan maidagin í 1922 helt hon kortini vera, at eingin dugdi at koyra bilin, sum tí var› skumpa›ur ni›an í Smi›juna hjá Wenzeli í Quillingsgar›i.

– Tí› er naka› snedigt naka›, plagdi Luffa at siga, tá hon greiddi frá, og so leg›i hon skemtandi afturat, at hon var vor›in alt ov gomul til at liva.

Ta› ver›ur saknur, nú slókna› er undir lonini í Baianstovu. Fri›ur veri vi› minninum um Oluffu Jensen.

Eirikur Lindenskov

---

†

Kunngjørt ver›ur fyri ætt og vinum, at elska›a kona, systir, svigarinda og gumma okkara

Ingibjørg Poulsen
fødd Samuelsen

anda›ist í heiminum 21. oktober 2000.
Jar›arfer›in ver›ur úr Vesturkirkjuni í dag, t‡sdagin 24. oktober kl. 14.

Fyri tey avvar›andi
Jóan Jakku

Tey, i› vilja senda blómur ella krans, kunnu í sta›in lata Frelsunarherinum í Tórshavn eina gávu, konto í peningastovninum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysingar@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Hjørdis Árnadóttir hjordis@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Sveinur Tróndarson sveinur@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
bokhald@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lystorg@sosialurin.fo
innsent@sosialurin.fo
tiltok@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Hann vann! Nú er tað tín túrur.

Shell ynskir Ferrari og Michael Schumacher tillukku. Heimsmeistaraheitið er avgjørt og sigurin fór til ein bil, sum Ferrari hevur gjørt, Michael Schumacher koyrdi og Shell hevur latið bensin og smyrjiolju á.
Sum veitari av brennievni og smyrjing til Ferrari fylgja vit hjá Shell sera væl við koyringini á kappkoyringarbreytini, og tann kunnleika, vit har fáa, nýta vit til alla tíðina at betra okkum. Og tað kemur tínum bili til gagns, tá tú fyllir bensin ella smyrjiolju á hjá Shell. Tí hví skuldu Michael og Rubens verið teir einastu, ið fingu gagn av okkara strevi?

-sama hvat